# Heini Olsen minnist og ørminnist




**Endiliga er Heini Olsen farin undir hetta, sum William Heinesen bað hann fyri eini 30-40 árum síðani: »Heini, gott í teg, fá onkran annan at fyrisita og projektera vegir millum býir og bygdarløg fyri Landsverkfrøðingin, og far tú heldur undir at skriva, tí tað liggur so sera væl fyri hjá tær - «**

## Umrøða



**Arnstein Niclasen**

Ja, nú er hon komin - bókin! Bókin? Ja, tann fyrsta av bókunum við endurminningunum hjá Heina Olsen, sum so mong hava longst eftir. Og hvør Heini er? Ja, tá er tað er helst lættari at nevna, hvat ið hann ikki er.

Men hinvegin er hann hálvur vestmenningur og hálvur válamaður, og sum drongur fekk hann mangt toyggið frá vestmannadreingjum fyri at vera kvívíkingur, og tað øvuta frá válarunum fyri at vera vestmenningur.

Barndómsheim hansara inni á Fjørð stendur mitt í millum hesi "hermótini", og hevur hetta helst verið eitt slag av "Checkpoint-Charlie", sum hitt kenda við Vestur-Berlin undir kalda krígnum, og hevur hetta eyðsæð gjørt, at Heini so at siga hevur "røntgent-fotograferað" hvønn gudsvin - bæði til andar og handar - sum har í øllum sakloysi er komin framvið, og hevur hetta helst gjørt, at Heini er mentur sum ørnin og hevur yvirlivað allar tær talsterku hendingarnar og brøgd, ið hann hevur verið úti fyri í fjarum londum í farnari øld.



*Heini Olsen er kosmopolittur, stórskemtari, royndasti vegaverkfrøðingur, vit hava átt, søguforteljari og í útsjónd ikki sørt átøkur sjálvum Ernest Hemingway*

*Mynd: Jan Müller*

Í útsjónd er Heini ikki sørt átøkur sjálvum Ernest Hemmingway, hann sum segði um Karen Blixen, at hon hevði uppiborið Nobelprísin, og sum hon við takk kvitteraði fyri við at siga, at hetta skoðsmálið fløvaði hana enn meiri - enn at fáa hesa framúr bókmentaheiðursløn.

Sjálv segði Blixen seg bara vera ein "a storyteller", og her hevur hon so - her á landi - fingið sín kappingarneyta í Heina. Tey líkjast tó ikki sum so í øðrum føri, annað enn tað at tey bæði hava verið burturi í heimi eini 15-20 ár av teirra bestu manndómstíð, skuldi eg heilsa og siga.

Heini er kosmopolittur, stórskemtari, royndasti vegaverkfrøðingur vit hava átt, listamálari, undirhaldari, søguforteljari, býarpolitikari (men hesum segðist hann undan eftir tveimum árum, og fór tá heldur til Nigeria at befatta seg við tey dimmhúðaðu har niðri - heldur enn at høsnast við smámál her heima - restina av valskeiðinum).

Hann er semingsmaður burturav, hann er totalt blottaður fyri (hóast eg haldi hann sjálvur hellur til fedranna kirkju) at halda hánt um, at onnur hava eina aðra lívsáskoðan (tað vóru einaferð átta religiónir á tí eina arbeiðsplássinum, ið Heini leiddi í Muhameds-landi, og hetta uttan nakra sum helst ósemju), og so er hann upphavsmaður til alla professionella ruskburturbeining her á landi. Og Lions-Club veteranur burturav og so: okk-ja, "you name it" - -.

Rørandi er frásøgnin um lívlanga vinarlag hansara við barndómsvinin Pola, sum fær okkum at minnast aftur á barna- og ungdómsbøkurnar um Høgna og Torkil í "Lognbrá" og "Fastatøkur" eftir Heðin Brú.

Heini kom, meðan at hann las verkfrøði í Horsens, at kenna eina vakra gentu í vakra Skanderborg økinum, og hon hevur fylgt honum gjøgnum gjálv og gjáir líka síðani tá - bæði um fløturnar í Persiu, "by the rivers of Babylon", um Afrika og Zanzibar til Vestmanna og heilt til Havnar.

Ein romanca, sum hevur roynst hendinga væl og hevur hildið til dagin í dag, hetta í mun til allar hinar romancurnar, sum dagliga hava hug til at bresta fyri nev hjá honum, men so heldigvís ikki meir enn tað - -.

Hetta seinasta krevur eina forkláring, og tað er, at Heini sum smádrongur var heldur veikligur og ofta songarbundin, og hetta fekk allar tær hjartagóðu kvinnurnar inni á Fjørð at hjúkla um hann sum teirra egna barn. Og tá ið Heini 17 ára gamal fór sín fyrsta og einasta túr til skips við "Keflavík", tá møttu allar hesar hjartagóðu av kvennkyni upp á kajuni at siga farvæl - við venan, tárum og øllum góðynskjum - til at skiparin, Viggo í Skúlanum, (pápi John og Árni Dam o.fl.) fekk nokk og bað tær anbefalla Heina í Harrans hendur og so sleppa sær eitt vist stað – ja, og tað langt vekk!

Men í takksemi til henda teirra góða lyndiseginleika hevur Heini ongantíð gloymt at lovprísa hesum "sterka kyni" fyri alt tekkiligt á fold - líka síðani "í vøggu hann lá" - og hildið fast um, at tær hava hildið lívið í honum til denna dag.

Heini og Kirsten giftust í Danmark í 1958 og bara seks dagar seinni stóð brúðurin eftir við døggvátum eygum á banagarðinum í Skanderborg, tá ið Heini fór til eitt bretskt byggifelag og seinni til Kampsax í Iran at starvast og vinna til dagin og vegin - og ikki minst at berja lestrarskuldina av sær sum skjótast.

Kirsten kom yvir til Iran og hansara eitt hálvt á seinni, og sambært Heinasa vektigu orð, svav hann tryggur sum barnið, um so partisankúlurnar hvinu um oyrini á teimum, tá ið hann í teltinum hevði Kirsten við sína vinstru lið og Kalasnikov- rifluna skotklára við sína høgru lið, men hetta er bara ein av teim mongum søgunum, sum vit enn eiga til góðar í komandi bókum á prenti - -.

Farið tí kvinna og maður av húsi og ognið tykkum "ársins bók". Og við henni hundraðtals myndir og søgur í hópatali, sum kunnu fáa øll børn at sovna við brestin og øll vaksin at liggja í andvekri til seinasta søgan er søgd!

Og til seinast, góði Heini, við málvininum Jonhardi og forlagnum Sprotanum, við Torkili á Estra og Vasti í Klaksvík til layout - og við Kirstini sum baklandi - hevur tú allar fyritreytir fyri við treysti at halda fram á leið. So "pull up your socks" og legg í vaðið, mín vinur.

Sosialurin